## Grønar íløgur í Kina

Kina brúkar nú nógv meiri pengar til varandi orku enn onnur lond. Í fjør brúktu kinverjar 34,6 milliardir dollarar til íløgur innan varandi orku. Tað var 50 prosent meiri enn í 2008 og nógv meiri enn nakað av hinum londunum í G20-bólkinum. Til samanberingar kann nevnast, at amerikonsku íløgurnar í varandi orku vóru 18,6 milliardir dollarar í fjør. Pew Environment Group, sum júst hevur almannakunngjørt eina nýggja frágreiðing um tær grønu íløgurnar í Kina, sigur, at tann kinverski íløguvøksturin er so stórur, at Kina er av álvara vorðið oddaland innan grøna orkumenning.



## Nei til burka

Í Vesturevropa eru tey flestu á einum máli um, at ein kvinna í burka hóskar ikki til ta vanligu gøtumendina, og nú vísir ein nýggj kanning, at í teimum størstu londunum er meiriluti fyri at banna kvinnum at ganga í burka. Kanningin, sum er gjørd fyri bretska blaðið Financial Times, vísir, at í Fraklandi taka 70 prosent undir við einum burka-banni, og at eitt tílíkt bann hevði fingið 65 prosent av atkvøðunum í Spania og 63 prosent í Italia. Í Bretlandi høvdu 57 prosent atkvøtt fyri at banna burka, og í Týsklandi høvdu 50 prosent sagt ja, og hini 50 prosentini høvdu sagt nei.




*Veiðan hjá línuskipunum, sum seinastu dagarnar hava roynt undir Føroyum, hevur seinastu dagarnar ligið millum 60.000 og 135.000 pund fyri túrin*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Línuskip liggja um páskirnar

**Línuskipini, sum hava verið úti seinastu dagarnar, eru nú á veg aftur av túri, og í dag landa seks línuskip á Toftum**

FISKIVINNA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í dag landa tilsamans seks línuskip á Toftum. Skipini eru Eystnes, Vesturhavið, Hoyvíkingur, Váðasteinur, Morgunstjørnan og Fiskivarði.

Fiskivarði, sum er ein minni línubátur, hevur umleið 12.000 pund, meðan veiðan hjá teimum størru línuskipunum liggur millum 60.000 og 135.000 pund.

Harry Benjaminsen á Landingarmiðstøð Føroya á Toftum sigur, at Vesturhavið, sum hevur 135.000 pund, hevur størstu lastina.

Hann vísir á, at nøkur skip hava mest longu og brosmu, meðan onnur hava meiri av toski og hýsu.

Væntandi kemur línuskipið Sigmundur inn at landa mikudagin og línuskipið Kambur, sum roynir við Rock All, kemur eisini inn til páskirnar, men fer at landa eftir páskir.

Línuskipið Mascot, sum setti sína last til sølu fríggjadagin, fekk ikki tann prís, sum skipið ynskti, og fór niður á bretska marknaðin við veiðini, sum í stóran mun var hýsa.

Yvirlitstrolingar:

# Sær betur út

**– Fyribils úrslitið fyri fyri tosk á landgrunninum er heldur lakari enn somu tíð í fjør, hýsan er framvegis í minking, og eisini varð minni fingið av upsa í ár samanborið við tvey tey seinastu árini. Bæði toskur, hýsa og upsi eru hampuliga væl í holdum. Tað er í stuttum ávegis niðurstøðan frá árligu yvirlitstrolingunum, sum Magnus Heinason hevur gjørt nú í vár**

GRANSKING

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Magnus Heinason er júst liðugur við yvirlitstrolingarnar á landgrunninum, og nú er skipið við manning farið út á Føroyabanka at gera yvirlitstrolingar har.

Høvuðsendamálið við hesum kanningum er at fáa til vega tilfar, sum skal brúkast í stovnsmetingum av toski, hýsu og upsa.

Toktleiðari á túrinum á landgrunninum var Jákup Reinert, sum eisini hevði onnur fólk við sær av Havstovuni.

Yvirlitstrolingarnar hava eisini til endamáls at kanna veiðina í vekt, tali, longdarbýti, vektbýti, aldursbýti, kynsbýti og kynsbúning av hesum fiskasløgum, eins og magar skulu takast og kannast. Tilfar til aldursgreining av havtasku og svartkalva skal eisini fáast til vega í hesum kanningum.

Kanningarøkið er kring allan landgrunnin, grynri enn 500 metrar. Ávíst tal av støðum verður tikið í hvørjum øki. Økini eru 15 í tali, og tilsamans eru 100 støðir fyri allan landgrunnin. Tað eru somu støðir, sum um somu tíð verða tiknar á hvørjum ári.

### Fyribils úrslit

Havstovan kann ikki við vissu siga nakað nágreiniligt frá yvirlitstrolingunum, fyrr enn nytrurnar eru lisnar, og øll data frá túrunum eru løgd í basu. Tó tekur stovnurin nøkur ávegis úrslit fram í ávegis frágreiðing, sum toktleiðarin hevur skrivað.

Tilsamans 46 ymisk fiskasløg vórðu veidd á hesum báðum túrunum, umframt mathøgguslokk, agnhøgguslokk, hummara og ymiskt annað, ið er bólkað sum skrambul, eitt nú krossfiskar, igulker og grót. Hetta er nakað meiri enn vanligt.

Av fiskasløgunum var nógv mest av toski, síðan kemur hvítingsbróðir, upsi, hýsa, lítli kongafiskur og gulllaksur. Hýsa fekst á 87% av støðunum, toskur á 86%, upsi á 83% og lítli kongafiskur á 72% av støðunum.

Jákup Reinert sigur, at størsti denturin á hesum túrum verður lagdur á tosk, hýsu og upsa, men eisini fæst ein ávís ábending um, hvussu støðan hjá øðrum fiskasløgum er.

– Eitt nú er hvítingsbróður vaksin nógv seinastu fýra árini og tykist vera heilt væl fyri. Eisini tykist longa, brosma, lítli kongafiskur og gulllaksur vera væl fyri. Hinvegin hevur lítið verið til av svartkjafti seinastu árini.

Taka vit fiskasløgini, tosk, hýsu og upsa, er tað serliga tølini fyri upsa, sum skulu takast við stórum fyrivarni. Upsi gongur í torvum, og verður rakt við eina upsatorvu, fæst nógv – og annars fæst lítið. Úrslitið sigur tí ikki so nógv um, hvussu nógv er til í økinum, har roynt verður.

– Nakað tað sama er galdandi fyri tosk í gýtingartíðini, sum er nú í mars. Tá savnast fiskurin ofta og stendur tættur í smáum økjum. Verður tóvað á tílíkum økjum, fæst nógv – uttan, at tað neyðturviliga merkir, at stovnurin er stórur, sigur Jákup Reinert.

### Ungur fiskur

Í ávegis frágreiðingini, sum Havstovan hevur gjørt um yvirlitstrolingarnar á landgrunninum, verður víst á, at stóra royndin eftir eitt nú toski ger, at stórur partur av stovninum er ungur fiskur.

– Tað verður tí tilgongdin av ungfiski tey einstøku árini, sum í stóran mun ger av, hvussu stórur stovnurin er.

Avleiðingin er, sigur Jákup Reinert, at bæði stovnur og veiða vilja vera skiftandi ár undan ári, tí tilgongdin er skiftandi.

– Vektin á einstøku fiskunum hevur sjálvandi eisini týdning fyri,

hvussu stór stovnsvektin er. Í ár vóru bæði toskur, hýsa og upsi hampiliga væl fyri.

Á eini talvu, sum fylgir ávegis frágreiðingini, vísir fiskifrøðingurin á, hvussu skjótt toskastovnurin kom fyri seg aftur eftir tey sera vánaligu kreppuárini tíðliga í nítiárunum. Orsøkin var teir sera góðu árgangirnir frá 1992 og 1993. Eisini hýsa vaks skjótt, og her vóru tað 1993 og 1994-árgangirnir, ið skaraðu framúr.

– Góð tilgongd hevur síðan fingið allar tríggjar stovnar at vaksa, men frá 2002 er toskastovnurin nógv minkaður til søguliga lág virði. Síðan 2007 er stovnurin tó vaksin aftur, men enn er langt eftir til støðið tey góðu árini.

Jákup Reinert sigur, at úrslitini frá yvirlitstrolingunum á landgrunninum í vár vóru eitt vet lakari enn í fjør.

– Alt bendir á, at toskastovnurin er í menning aftur, men júst hvussu nógv, er trupult at meta um bert út frá hesum kanningum. Ikki fyrr enn nytrurnar eru lisnar um einar tvær vikur, kann aldursbýtið í stovninum verða roknað, so at eitt nú støddin á nýggjum árgangum kann verða mett.

Men umráðandi er, leggur hann dent á, at smáfiskurin fær frið at vaksa, so at toskastovninum veruliga kann koma fyri seg aftur.

### Glottar fyri stavn

Yvirlitstrolingarnar á landgrunninum vísa, at hýsuveiðan er minkað støðugt síðan ár 2002 og fyribilsúrslitið, sum fyriliggur frá yvirlitstrolingunum hesaferð, er á leið tað sama sum í 1994.

– Størsta orsøkin til hesa minking stavar helst frá vánaligari tilgongd í nógv ár. Minkingin seinasta árið var ikki stór og nakað av smáari hýsu, sum varð gýtt í fjør, varð fingið í ár. So helst eru glottar fyri stavn - eisini fyri hýsu, leggur fiskifrøðingurin aftrat.

Um upsa, endurtekur hann, at her eru stórar óvissur við slíkum kanningum, og tí skulu niðurstøðurnar takast við fyrivarni.

– Hóast stovnurin tykist vera í minking, er líkt til, at upsastovnurin kortini er lutfalsliga væl fyri, sigur Jákup Reinert, toktleiðari.

*– Umráðandi er, at smáfiskurin fær frið at vaksa, so toskastovninum veruliga kann koma fyri seg aftur, sigur Jákup Reinert*

*Mynd: Rógvi K. Mouritsen*